LM-025/2020

2

SINNISBATI

Tórshavn, 06. juli 2020

Heilsumálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Hoyringsskriv viðvíkjandi "Uppskot til løgtingslóg um royndarskipan um ókeypis sálarfrøðiliga hjálp til persónar millum 15-35 ár, sum hava angist ella lætt til moderat tunglyndi".

Sinnisbati hevur fáar viðmerkingar til uppskotið, sum viðgerð royndarskipanina um ókeypis sálarfrøðiliga hjálp/viðgerð til borgarar, ið eru millum 15 og 35 ár, við angist og/ella lætt til moderat tunglyndi. Sum heild er Sinnisbati fyri uppskotinum og heldur at uppskotið hevur nógv jaligt innihald, sum seinni kann víðkast til aðrar aldurbólkar og sjúkrabólkar innan økið, um mett verður at royndarverkætlanin er eydnast væl, tá royndartíðin á trý ár, er av.

Grundgevingarnar fyri uppskotinum og innihaldið av royndarskipanini eru væl grundaðar og væl lýstar. Sinnisbati gleðist um, at enn eitt tilmæli í Heildarætlanini fyri sálarliga heilsu, sum bleiv latið táverandi landsstýrisfólki í Heilsumálum á Altjóða Sálarheilsudegnum, 10. oktobur í 2018, verður til veruleiki.

Hóast komandi tilboð um ókeypis sálarfrøðiliga hjálp til ung og vaksin millum 15-35 ár er eitt jaligt stig á leiðini í at betra um korini hjá teimum borgarum, sum kunnu kenna tað trupult í støðum, er tað týdningarmikið at hava í huga, at tilboðið í summum førum, kann fáa við sær, at fleiri ung og vaksin, sum eru fevnd av royndarskipanini, kunnu hava/fáa tørv á psykiatriskari viðgerð. Hetta merkir sostatt, at fleiri ressursir mugu latast til útgreiningar og viðgerðatilboð/møguleikar á psykiatriska deplinum, í økispsykiatriini og í sosialpsykiatriini, undir Almannaverkinum. Hetta fyri at tørvurin á viðgerðartilboðum og starvsfólki kann økjast. Somuleiðis merkir hetta, at ætlanin um eina psykiatriska tilbúgving av verandi skaðastovuskipan, verður neyðug at skumpa upp undir, soleiðis at tey sum kunnu koma at hava tørv á meira og/ella aðrari útgreiðning/viðgerð, kunnu sleppa framat skjótast til ber. Sinnisbati gleðist um, at hetta arbeiðið er farið í gongd, og ein arbeiðsbólkur er settur at orða eitt tilmæli, sum verður latið landsstýrismanninum í Heilsumálum innan stutta tíð. Sinnisbati vónar, at tilboðið um ókeypis sálarfrøðiliga hjálp, kann vera eitt lið í arbeiðinum at menna og byggja undir fleiri fyribyrgjandi átøk, sum arbeitt verður við og sum tørvur verður á nú og í framtíðina. Hetta fyri at lofta sárbærastu bólkarnar úr lívsumstøðum, sum við skjóta hjálp og/ella viðgerð, kann fyribyrgjast og byrgja fyri kroniskum líðingum.

Samanumtikið er Sinnisbati jaligt um uppskotið og fortreytirnar harum, umframt at felagið fegnast um, at vit eru komin enn eitt fet á leiðini í at viðurkenna menniskju við sinnisligum avbjóðingum, í føroyska samfelagnum.

Vegna Sinnisbata,

Róa Midjord, forkvinna Laura K. Apol, aðalskrivari

Sinnisbati • Íslandsvegur 10C, FO-100 Tórshavn • +298 59 7913 • sinnisbati@sinnisbati.fo • www.sinnisbati.fo